# Rolling Stones og Eagles á torginum

**Konsertferðir til teir báðar stóru bólkarnar, eins og ferðir til Champions League finaluna og Lalandia verða at vinna, tá ÍF-stuðlar hósdagin til leygardagin skipa fyri tiltaki á Torginum í SMS**

TILTAK
*tíðindaskriv*

Hvør kundi ikki hugsað sær at sloppið til Lalandia ella konsert við Rolling Stones ella The Eagles ella til Champions League finaluna í París? Hetta fáa øll vitjandi í SMS møguleikan til frá hósdegnum til leygardagin, tá ÍF-stuðlar skipa fyri øðrvísi og forvitnisligum tiltakið á Torginum í SMS.

**Gálgasino, tombola og el-bilar**
Í sambandi við tiltakið á Torginum, hava fuglfirðingar fingið fatur á einum sokallaðum Gálgasinuspæli, sum er ein pláta við 240 feltum á, sum eru merkt frá 1-240. Seldir verða lutaseðlar frá 1-240, og tá ið hesir eru seldir, verður ein terningur sleptur úr gáganum í miðjuni á plátuni, og tað talið, sum terningurin fellur á, hevur vunnið vinningin. Hósdagin kl. 17.15 verður drigið um 2 atgonumerki til Rolling Stones konsertin, sum verður í Glasgow 25. august.

Somu tíð fríggjadagin verður drigið um 2 atgongumerki til Eagles konsertina, sum verður í Londin 17. juni. Seðlarnir til hesi bæði spølini kosta kr. 50,00 fyri hvønn.

Leygardagin kl. 15.30 verður lutakast um størsta vinningin, sum er ein ferð fyri tveir persónar til Champions League finaluna í fótbólti, sum verður í París 17. mai. Hesir seðlarnir kosta kr. 100,00 fyri hvønn.

Íroknað allar vinningarnar er gisting, flogferð og ávísur flutningur.

Umframt burturlutingina av stóru vinningunum í Gálgasino-spælinum, eru el-bilarnar til smærru børnini, vøru- og bamsutombola, skava&vinn-seðlar og lutaseðlasøla.

**Sudoku-kapping**
Í sambandi við tiltakið í SMS verður eisini skipað fyri sudoku-kapping. Í mesta lagi 32 luttakarar fara at kappast um heiðurin sum »Besti Sudoku-spælari«, umframt at vinnarin fær eina familjuferð við Smyril Line.

Kappingin verður skipað í tveimum innleiðandi umførum, eitt hósdagin og hitt fríggjadagin. 16 luttakarar fáa pláss til hvørt umfarið, harav tveir fara víðari til finaluna, sum verður leygardagin. Á torginum verða settir upp tveir stórskíggjar, har tveir luttakarar loysa hvør sína uppgávu. Tann ið er fyrstur at loysa uppgávuna, fer víðari. Kappingin er sostatt skipað eftir einum cupleisti, har hvørt innleiðandi umfarið so endar við tveimum luttakarum, sum hava vunnið sær pláss í finaluni. Í sjálvari finaluni, sum verður leygardagin 25. mars, verða sostatt fýra luttakarar sum kappast um høvuðsvinningin, sum er ein familjuferð til Lalandia, fyri fýra persónar við bili. Seinasta freist at melda til, er mikukvøldið 22. mars á tel. 556661 ella sudoku@kallnet.fo, og fullteknað er tá 32 luttakarar hava boðað frá luttøku.

Leygardagin kl. 13.30 verður málningauppboðssøla á Torginum. Málningar, sum seldir verða á uppboði, kunnu skoðast á Torginum frá hósdegnum. Listafólkini, sum hava málað, eru Øssur Mohr, Heðin Kambsdal, Frits Johannesen, Ian Luid og Randi Gunnarsdóttir. Uppboðssøluhaldari leygardagin er Torbjørn Jacobsen.



*Hósdagin kl. 17.15 verður drigið um 2 atgonumerki til Rolling Stones konsertin, sum verður í Glasgow 25. august*

# Kontripunkur og Dreymarokku í Tórsgøtu



*Deja Vu góvu eina av ársins best umtóktu fløgum út í fjør*

**Í dag almannakunnger Asfalt 2 nøvn afturat á ársins tónleikatiltaki. Fyrireikararnir hava tryggjað sær vágabólkin Villmenn og Deja Vu úr høvuðsstaðnum**

ASFALT
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Villmenn og Deja Vu verða millum bólkarnar, ið fara á pall á Asfalt í Tórsgøtu í summar. Bólkarnir ið higartil eru almannakunngjørdir fevna breitt, men eingin ivi er um, at hesi bæði nøvnini geva tiltakinum enn meira breidd. Hetta eru tveir egnir bólkar, ið á hvør sín hátta eru besti føroyski bólkur innan sína tónleikagrein.

**Kontripunkur frá Villmonnum**
Føroysku kontripunkararnir og Prix Føroyar veteranarnir í Villmonnum eru altíð ein stórsligin tónleikauppliving. Tónleikararnir í Villmonnum eru eingir ársungar innan rútmiskan tónleik. Bólkurin er ein samanrenning av Holgar og Villmonnum og prix finalistunum frá 1997 Arrestment. Tvær av størstu rokkhetjunum nakrantíð úr Vágum, Finnur Joen Jacobsen og Holgar Jacobsen, eru frontmenn.

Bólkurin gav í fyrra árið fløguna Feikleikans Ringrás út, og hendan verður roknað sum ein sannur føroyskur kultklassikari, við undirgrundslandaplágum sum tittullagnum og "Løggan kemur". Í løtuni arbeiðir bólkurin við eini nýggjari útgávu. Á heimasíðuni hjá Villmonnum finst ein forsmakkur uppá fløguna, kærleikssangurin Cyberspace. Hesin kom beint inn á 15 tær bestu, og kann lætt gerast bæði kvøðuljómsklassikari og undirgrundshitt.

**Dreymarokkur frá Deja Vu**
Deja Vu fekk sítt veruliga gjøgnumbrot, tá bólkurin í 2003 gjørdist nummar tvey í Prix Føroyum. Líka síðan tá hava føroyingar bíða eftir fyrstu fløguni hjá bólkinum. A Place To Stand On kom út í fjør og var m.a. vald ársins fløga av lesarum hjá Dimmu. Á Planet Awards var fløgan somuleiðis í uppskoti til bestu fløgu.

Tónleikurin er ein sveimandi og droymandi streymur av tónum, ið dregur lurtaran inn í alheimin hjá bólkinum. Teir skapa eina flotta ljóðmynd.

Bólkurin hevur tveir oddamenn, Líggjas og Flóvin, ið skiftast um leiklutin sum sangari. Bólkurin hevur spælt á flest øllum tónleikatiltøkum í Føroyum, og tað er greitt at bólkurin hevur vónir um at gerast kendur uttanfyri Føroyar.

**Nógv nøvn eftir**
Fyrireikararnir av Asfalt hava ætlanir um, at eini 70 bólkar vera við á Asfalt. So nógv nøvn eru eftir at almannakunngerða. Higartil eru hesi 16 nøvn almannakunngjørd: 200, Annika Hoydal, Deja Vu, Isadora & The Rebels, Kamarkórið, Kári Sverrisson, Lena, Makrel, Marius, Poppkorn, Pætur við Keldu, Safir, Side Effect, Skunk, Stanley Samuelsen og Villmenn. Ein vitnisburður um breiddina og høgu góðskuna í føroyskum tónleiki.

# Konsertir við Instinkt og Spælimonnunum

**Í hesi vikuni verður høvið at fara til tríggjar fjølbroyttar spælimannskonsertir við danska bólkinum Instinkt og føroysku Spælimonnunum**



*Talan er um norðurlendskan og amerikanskan fólkatónleik í breiðum høpi*

KONSERTFERÐ
*Tíðindaskriv*

Konsertirnar verða í Ungmannafelagshúsinum Kelduni í Skálavík hóskvøldið 23. mars kl. 19, í Bryggjuni í Vestmanna fríggjakvøldið 24. mars kl. 23, og í Kaféini í Norðurlandahúsinum leygardagin 25. mars kl. 16. Hetta er seinasta FO-DK Konsertferðin í vetur, sum Norðurlandahúsið skipar fyri saman við FUT, DJBFA og DAF. Konsertirnar eru stuðlaðar av Atlantic Airways.

**Instinkt**
Instinkt spælir fólkatónleik við støði í bæði donskum, norðurlendskum, írskum og fronskum/kanadiskum fólkatónleiki. Men tónleikurin hjá bólkinum er eisini ávirkaður av heilt øðrum tónleikasjangrum, og verður oftani nevndur "folkbeat". Instinkt gav út fløguna "HUR!" í 2002, og í 2003 fingu tey fýra virðislønir á Danish Music Awards Folk, millum annað fyri ársins fólkatónleikafløgu og ársins ljóðførisleikara, sum fór til trummuspælaran í bólkinum, Vivi di Bap. Instinkt hevur síðani bólkurin bleiv stovnaður fyri fimm árum síðani verið á konsertferðum bæði í Danmark, Norra, Týsklandi, Skotlandi, Hebridunum, Póllandi og Kanada. Limirnir í bólkinum hava spælt í bólkum sum Moving Cloud, Kætter Kvartet, Impotators og Sorten Muld, og liveframførslan hjá Instinkt hevur millum annað verið samanlíknað bæði við Gåte og Kaizers Orkchestra. Í Instinkt spæla Søren Korshøj Nielsen (violin, vokal, gittar), Louise Ring Vangsgaard (violin, vokal), Martin Seeberg (floytur, bratsj, "drejelire", gýðingaharpu, vokal), Malene Daniels Beck (el-bass, kontrabass, vokal) og Vivi di Bap (trummur, djembe, slagtól, vokal).

**Spælimenninir**
Spælimenninir spæla traditionellan og modernaðan norðurlendskan og amerikanskan fólkatónleik. Bólkurin hevur spælt saman í meiri enn 20 ár, og hevur verið á hópin av konsertferðum í Danmark, Svøríki, Orknoyggjunum, Hetlandi, Skotlandi, Fraklandi, Finlandi og USA, har tey millum annað hava spælt á fólkatónleikafestivalum og øðrum konsertstøðum. Bólkurin hevur útgivið íalt 8 fløgur. Á hesi konsertferðini eru tó nøkur av upprunamanninginí skift út við nýggjari yngri manning, og bólkurin er sostatt samansettur av Daniel Nielsen (violin), Angelika Nielsen (violin), Jákup Lützen (violin), Ívar Bærentsen (mandolin, gittar), Andreas Restorff (bass), Kristian Blak (klaver) og Sharon Weiss (blokkfloytu).